

*Andrei saman við Óla Jákup Jacobsen, sum Andrei eisini vitjaði á føroyaferðini*

## Fugloy og Svínoy

Andrei hevur ikki ligið á latu síðuni, meðan hann hevur verið í Føroyum. Hann hevur roynt at vitja so nógv støð, sum gjørligt.

"Túrurin í Føroyum hevur verið einanstandandi góður. Um eg skal taka dagar ímillum, so má eg siga, at túrurin út til Svínoyar og Fugloyar við tyrlu var serstakliga góður. Tað góða útsýnið frá tyrluni er stórsligið. Men eisini tær gomlu bygdirnar í Svínoy og Fugloy vóru áhugaverdar, tá hugsað verður um, at tað búgva fýra-fimm ferðir so nógv fólk har um summarið enn um veturin."

"Føroyar og Ísland minna annars nógv um hvørt annað."

"Blíðskapurin í Føroyum hevur eisini verið framúr. Eitt dømi er, at eg við einum føroyskum vini var í Kallsoynni. Vit komu í prát við fólk og vórðu beinanvegin boðin inn til kaffi í øllum bygdunum," sigur Andrei.

## Ótrúligt tónleikalív

Hóast nattúran er sera stórsligin í Føroyum, so er tað ikki júst hon, sum hevur hugtikið Andrei mest. Harafturímóti er tað tann føroyski tónleikurin, sum fekk sligið beini-ni undan Andrei.

"Tit føroyingar skulu vera sera stoltir av tykkara tónleiki. Eg haldi ikki, at eg nakrantíð havi upplivað eina so lítla tjóð við so nógvum góðum tónleiki. Eg valdi eitt nú at fara á G-festivalin. Satt at siga so væntaði eg ikki tað heilt stóra, men hann var eitt ógvuliga positivt yvirraskilsi. Stemningurin var sera góður, og festivalurin var ógvuliga fjølbroyttur, tí har vóru so nógvir ymiskir bólkar í stíli. Um eg skal taka nakrar føroyskar bólkar, sum mær dámdi sera væl, so má tað vera Valravn og Høgni Lisberg. Tó má eg siga, at tann allarbesti føroyski bólkurin var Orka. Teimum hevði eg kunnað lurtað eftir í tímavís," sigur Andrei.

"So at siga allir teir føroysku tónleikararnir eru amatørar, men teir spæla á einum sera professionellum støði. Tá eg las De fortabte spillemænd, føldi eg hvussu nógv tónleikurin hevði at siga fyri føroyingar. Møguliga á sama hátt sum bókmentir fyri íslendingar, og eg plagi at minnast aftur á hesa skaldsøguna, tá eg hoyri ein nýggjan góðan føroyskan bólk," sigur Andrei.

"Um eg skal nevna eitt annað stuttligt tónleikaupplivilsi, sum eg havi havt her í Føroyum, so var tað við Múrin. Hóast eg komi frá Moskva, har tað kann vera sera kalt, so vóru konsertirnar við Múrin nógv tær kaldastu konsertirnar, sum eg nakrantíð havi upplivað," sigur Andrei skemtandi.

## Kemur vónandi aftur skjótt

Tíverri fyri Andrei lá tað ikki fyri hjá honum at vera í Føroyum um ólavsøkuna.

"Eg hevði ógvuliga fegin viljað verið her og upplivað tykkara tjóðarhátíð, ólavsøkuna. Men tað lá ikki fyri, tá eg skuldi byrja at arbeiða aftur ólavsøkudag," sigur Andrei, "men vónandi komi eg aftur til Føroya, áðrenn langt umlíður – tað skulu í hvussu so er ikki ganga tíggju ár til mína næstu vitjan," sigur Andrei smáflennandi.

## Langabbi bardist við Stalingrad!

Ein tann ræðuligasti bardagin í nýggjari tíð var týska innrásina í Sovjet í 1941, og serliga var hetta galdandi fyri bardagan um Stalingrad, sum rættuliga var byrjanin til endan hjá Hitler

Omanfyri tvær millión fólk doyðu antin beinleiðis ella óbeinleiðis í tí ræðuliga bardaganum við Stalingrad. Fyri flestar føroyingar er hetta bert ein partur av heimssøguni sum so nógv annað. Men tað er tað ikki fyri Andrei, tí langabbi hansara var í sovjetiska herinum øll fýra árini, har hann millum annað var í bardaganum við Stalingrad.

## Sníkti seg í kríggj

"Tá kríggið brast á í Ruslandi í 1941, var langabbi í móðirætt 37 ára gamal, og hann var tí ikki innkallaður í herin. Ein morgunin langomma vaknaði, legði hon til merkis, at maðurin ikki lá í songini. Hon undraðist yvir, hvar hann mundi vera farin so tíðliga á morgni, so hon lat seg í klæðir og fór upp. Maðurin var hvørki til at síggja ella at hoyra, og komin innar í køkin fekk hon eyga á ein seðil, sum lá á køksborðinum. Hon tók hann upp og byrjaði at lesa. Tá vísti tað seg, at hetta var eitt bræv frá langabba, har hann greiddi frá, at hann hevði avgjørt at melda seg til herin. Kærleikin til móðurlandið og familjuna búði so sterkur innan í honum, at hann



*Tað eru nakrir heilt fáir mans úr gamla Sovjetsamveldinun, sum heima hava lært seg føroyskt. Ivan Moskalenko er væl kendur. Sergej Halipov úr St. Peterburg er ein. So er tað Dmitr Javalenko úr Ukraina, sum nú býr í Noregi við konu og barni. Hann var blaðungur, tá ið hann dugdi raðið føroyskt. Tey vóru í Føroyum í summar. Dnitir hevði vunnið ferðina á føroyska básinum á eini oljumessu í Noregi. Hetta hevði hann so søttliga uppiborið*

vildi geva lívið, um tað kravdist. Hann sá sær ongan annan máta at fara uttan at sníkja seg, tí langomma hevði á ongan hátt givið honum loyvi at fara," sigur Andrei.

"Langabbi arbeiddi sum telefonmaður øll fýra krígsárini. Hetta var sera vandamikið, tí hann og hansara herdeild skuldu ofta fara yvir frontlinjuna fyri at leggja telefonkaðalar. Tá russarnir so gjørdi álop á týska herin, máttu teir longu hava telefonsamband á týska økinum. Ikki sjálvdan skuldi hetta gerast, meðan bardagarnir vóru harðastir, so hann skuldi sníkja seg yvir frontlinjuna undan skotum frá báðum síðunum. Hetta var so eisni hansara uppgáva í bardaganum um Stalingrad. Hóast hann varð særdur, so yvirlivdi hann tíbetur kríggið," sigur Andrei.

## Omman hevði marruna um nazistar restina av lívinum

"Omma mín í faðirætt var fødd í eini lítlari bygd í Suður-Russlandi. Hon var 10 ára gomul, tá kríggið brast á, og økið, har hon búði, varð hertikið av nazistunum. Hon var lukkulig yvir, at í bygdini hjá sær steðgaði "bert" ein læknadeild frá týska herinum. Hetta vóru heldur siviliseraðir menn, so tað var ikki eins nógv av drápum og tílíkum í hennara bygd sum aðrastaðnis.

Men í eini aðrari bygd nærindis, steðgaðu vanligir týskir hermenn, og har var støðan heilt ræðulig. Nakrar ferðir goymdu foreldrini hjá ommu heima hjá sær særd fólk úr tí bygdini, sum yvirlivdu ræðuleikarnar hjá týskarunum. Hetta var sjálvsagt deyðiliga vandamikið bæði fyri foreldrini hjá ommu, fyri hana sjálva og systkini. Hon hevði alt lívið ofta marruna um kríggið og nazistarnar," sigur Andrei.

## Russar ofta órættvíst skuldsettir

Ofta verður sagt, at tá russararnir komu til týsk økir, uppførdu teir seg líka ófantaliga, sum nazistarnir gjørdu. Hesar útsagnir fella Andrei sera tungt.

"Hetta er púra burturvið og hóskar á ongan hátt saman við søguligum keldum. Nazistarnir hildu russar og aðrar tjóðir í Sovjet hava minni menniskjasligt virði enn tær germonsku ("arisku") tjóðirnar, og hetta endurspeglaði seg í, hvussu teir fóru við fólki í hertiknum sovjetiskum býum og bygdum. Teir drópu, rændu og neyðtóku, ruku fólk úr sinum egnu heimum, píndu tey ella brendu tey livandi, sjálvt um hetta vóru børn, kvinnur ella gomul. 7.4 mill. íbúgvar av USSR (av hesum 200 túsund børn) vóru dripin undir týsku hersetingini, 4.1 mill. onnur doyðu av hungri ella sjúkum. Fólk í hundraðtúsundatali vórðu koyrd til Týsklands til trælaarbeiði.

Fleiri býir, sum okkara herur tók frá týskarunum, vóru so oyðilagdir, at tað var neyðugt at byggja teir upp aftur næstan frá grundini. At siga at russar framdu nakað líknandi í Týsklandi er nakað langt úti. Ikki bara tí, at vit ongantíð hildu týskarar vera eitt verri fólkaslag enn onnur. Tað var haraftrat strangliga bannað hjá okkara hermonnum at fremja brot á hersettu økinum. Man kann ikki nokta, at tað vórðu framd brot, tá russiski herurin kom inn á týsk øki, men tey vóru strangliga revsað.

Eg las einaferð eitt bræv frá einum sovjetiskum hermanni, sum argaðist yvir, at sovjetiska hersetingarvaldið í Týsklandi gav týsku íbúgvunum betri mat enn hermonnunum sjálvum. Hetta er eitt av sera mongu prógvunum, at russarnir fóru meira menniskjansliga við týska fólkinum enn nazistarnir gjørdu við tað russiska. Viðferðin hjá týskarunum og russarunum kunnu bara ikki á nakran hátt samanberast," sigur Andrei at enda.



*Her er Andrei saman við langabbanum Mihail, sum í síni tíð var við til at geva Hitler endabrestin í bardaganum um Stalingrad. Langabbin doyði í 1986, 82 ára gamal, so Andrei minnist hann væl*



*Soleiðis endaði bardagin um Stalingrad í 1943. Syrgiligu leivdirnar av týska herinum er her á veg í fangalegu. Bert fáir av teimum komu aftur til Týskaland. Langabbi Andrei átti sín leiklut*